# Fundur um røktarheim í Suðuroy er seinkaður

**Ætlanin var at kommunurnar í Suðuroy skuldu hittast um vikuskifti at tosa um ætlaða røktarheimið í Vági, men tað verður av ongum**

RØKTARHEIM Í VÁGI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fundurin, sum kommunurnar í Suðuroy skuldi halda um ætlaða røktarheimið í Vági, er seinkaður eitt sindur.

Ætlanin var, at umboð fyri tær sjey kommunurnar í Suðuroy skuldu hittast antin beint fyri hetta vikuskiftið, ella fyrst í næstu viku at tosa um ætlaða røktarheimið í Vági, men tað er nú greitt, at hetta verður av ongum.

Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porkeri sigur, at tað liggur ikki fyri hjá onkrum kommunum at hava fundin beint nú, so fundurin er útsettur eitt sindur.

Hann leggur tó afturat, at fundurin verður í næstum.

Kommunurnar skulu tosa um at byggja røktarheim í Vági eftir tí tilboði, sum landsstýrið hevur sett fram.

Landsstýrið hevur gjørt av at flyta ætlaða miðnámsskúlan til Hovs og leggja hann í ein skúladepil har.

Afturfyri hevur landsstýrið skotið upp at byggja røktarheim á stykkinum í Vági, sum var ætlað til miðnámsskúlan og tað er hetta, sum kommunurnar skulu viðgera, tí tað eru tær, sum skulu taka stig til røktarheimsbygging.

Samstundis er Landsstýrið sinnaðat gera eina lagaliga fíggingarskipan, so at allar kommunurnar í Suðuroy hava ráð til at vera við, uttan at sleppa grundregluni um, at tær skulu betala helvtina av byggikostnaðinum.

Vágs Kommuna hevur ikki viljað hoyrt talan um at offta skúlan fyri eitt røktarheim. Men nú avgerðin er tikin um at flyta skúlan, er hevur Vágs Býráð samtykt at samráðast við hinar kommunurnar og landsstýrið um at byggja røktarheim í Vági.

Men Vágs Kommuna læt við vilja vera við nevna, hvar í Vági hetta røktarheimið skal byggjast.

Býráðið sigur, at sum málið liggur í løtuni er byggiloyvið givið til ein miðnámsskúla á stykkinum vesturi á Eiðinum og onki annað.

So veldst um, hvat samráðingarnar fara at føra til.



*Eli Frederiksen, borgarstjóri í Porker*

# Kundu skrivað 1000 bøtur um dagin

**Tað er heilt hopleyst at fáa fólk at brúka trygdarbelti, sigur politiið í Klaksvík**

FERÐSLUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Einastu ráðini eru at hækka bótina fyri at koyra við ongum trygdarbelti so at hon veruliga merkist, sigur politistur í Klaksvík*

– Talið á bótum, vit kunnu skriva um dagin, er bara ein spurningur um, hvussu nógv fólk, vit hava.

– Tað verður sagt av politistøðini í Klaksvík.

Umvikuskiftið visti útvarpið at siga,at løgreglan í Klaksv´ík hevði gjørt eitt ordans hál nú ein dagin, hon kannaði ferðsluna. Uppá góðar fýra tímar høvdu teir skrivað 102 bøtur og tað var kanska met hjá løgregluni í Føroyum.

Nógv tær flestu bøturnar verða skrivaðar tí at fólk ikki brúka trygdarbelti.

– Tað er heilt vónleyst at fáa fólk at brúka trygdarbelti og høvdu vit nokk av fólki, kundu vit sum onki skriva 1000 bøtur um dagin, sigur politistur á vakt á politistøðini í Klaksvík.

– Talið á bótum er bara ein spurningur um, hvussu nógv fólk vit hava, leggur hann afturat.

Politisturin í Klaksvík sigur, at løgreglan ger ferðslukanningar regluliga og skrivar bøtur, men tað hjálpir púra onki.

– Vit kunnu koma fyri at steðga somu fólkum við ongum trygdarbelti fleiri ferðir sama dag, sigur hann.

Hann sigur, at tað er bara beint aftaná, at politiið hevur gjørt ferðslukanningar, at tað hjálpir eitt sindur, men so slaka fólk aftaftur og so er líka galið sum tað var framman-undan.

– Tað er so galið, at hóast tað verður gjørt vart við tað í bløðunum og hóast Ráðið fyri Ferðslutrygd hongur plakatir upp og ávarar í lýsingum um, at ferðslukanningar verða gjørdar, ger tað ikki mun.

Politisturin heldur, at einastu ráðini er at hækka bótina so at tað veruliga merkist.

– Fyrrenn fólk fáa eina bót sum merkist, væmnti eg ikki at tað fer at hjálpa, sigur hann.

# Meiri politi á gøtuna og betri hugburður ímillum fólk

**– Tíverri eru fólk bangnari fyri at fáa 200 krónur í bót enn tey eru fyri teimum skaðum tað kann føra við sær, tá ið tey ikki brúka trygdarbelti, sigur forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLUTRYGD



*– Foreldur, sum lata smábørn síni sita leys í bili, hava ikki skilt nógv av álvaranum í málinum, heldur hon. Tað er ikki til at fata, heldur forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd*

– Skulu vit gera tað natúrligt hjá fólki at brúka trygdarbelti, eru tað nógv viðurskifti, sum skulu broytast.

Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd er skelkað at tað skal gangast so illa at fáa fólk at brúka trygdarbelti soleiðis sum løgreglan hevur givið fleiri dømi um seinastu dagarnar.

Ein politistur, sum Portalurin tosaði við í gjár, helt, at einasta loysnin var at hækka bótina fyri at koyra við ongum trygdarbelti so at hon verður so stór at tað veruliga merkist.

Tað heldur Rúna Sivertsen kann vera ein gongd leið.

– Tíverri vísir tað seg, at fólk eru bangnari fyri at fáa eina bót enn tey eru fyri teimum skaðum, tað kann føra við sær, at tey ikki brúka trygdarbelti.

Men hon heldur eisini, at tað er sera umráðandi at løgreglan er sjónligari úti á gøtuni og ger meiri við at kanna ferðsluna.

– Eg havi koyrt bil í Klaksvík 30 ár og eg kann ikki minnast, at løgreglan hevur steðgað mær. Eg Havi eisini koyrt óteljandi ferðir ímillum Leirvík og Havnina, men tær ferðirnar, eg eri steðgað, kunnu teljast á aðrari hondini.

– Tað sigur eitt sindur um, hvussu nógv løgreglan ger við ferðslukanningar, men eg ivist ikki í, at tað er fyribyrgjandi, at løgreglan er úti á vegunum.

Forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd heldur avgjørt, at Løgreglan skuldi gjørt meiri burturúr at kanna ferðsluna, tí ongn hevur ráð til at betala bót umaftur og umaftur.

Løgreglan sigur hvørja ferð, at løgreglan ger so nógv, sum hon kann, við teirri manning, hon hevur. Og tað er altso ikki Føroyskir myndugleikar, sum gera av, hvussu løgreglan skal skipast, tí hon er donsk.

– Nú kemur tú inn á ein politiskan spurning. Men heppin støða er hetta ikki, sigur Rúna Sivertsen.

## Primitivan hugburð til ferðslu

Annars heldur Rúna Sivertsen, at tað er neyðugt at hugburðurin hjá fólki til ferðslutrygd má broytast.

– Vit hava ein ómetaligan primitivan hugburð til ferðslutrygd og tað tykist sum um at fólk als ikki skilja innast inni, hvussu stóran týdning trygdarbelti hevur.

– Foreldur, sum lata smábørn síni sita leys í bili, hava ikki skilt nógv av álvaranum í málinum, heldur hon. Tað er ikki til at fata, heldur hon.

Hon heldur, at allir partar eiga at ganga saman um at royna at broyta hugburðin hjá fólki.

– Bæði politiskir myndugleikar, heilsuverkið og skúlaverkið mugu ganga hond í hond fyri at loysa trupulleikan.

Eitt nú heldur hon, at politisku myndugleikarnar eiga at raðfesta ferðslutrygd hægri, so at tað verður sett á dagsskránna fyri at tað kann verða ein natúrligur partur av gerandisdegnum. Tað kann bæði gerast við at styrkja undirvísingina í ferðslutrygd og tað kann gerast við at útvega hagtøl, so at vit fáa lagt tað fyribyrgjandi arbeiðið á rætta stað, sigur hon.

Men tað er eisini neyðugt at ábyrgdrfólk í landinum ganga undan sum góð fyridømi.

– Eg havi sæð politist fylla fleiri børn í bilin enn trygdarbelti eru til. Hvat skulu vit onnur so hugsa, spyr Rúna Sivertsen.

Hon leggur afturat, at kanningar vísa, at ferðsluskaðar kosta føroyska samfelagnum næstan 200 milliónirum árið, sum kundu verðið brúktar til nógv hentari endamál.